## DAGSINS MEINING

# Skúladømi um vánaliga tilrættislegging

Ferjulegurnar til Smyril og Norrønu eru aftur eitt dømi um tilvildarliga tilrættislegging á samferðsluøkinum. Eisini er málið eitt dømi um vantandi samróður millum Tórshavnar Kommunu og Vinnumálaráðið. Vinnumálaráðið líkasum vendi bakið til, tá tað gjørdist greitt, at Smyril vaks nógv í vavi og Tórshavnar býráð avgjørdi at gera tvær ferjulegur inni við Bursatanga í staðin fyri eina. Harafturat hugsaði eingin um fornminnið Tinganes. Úrslitið er ruðuleiki.

Natúrliga er Eystaravág lítil, men hon er vald til ferðafólkahavn og til farmaflutningshavn. Tað er natúrligt, at Smyril hevur sítt fasta atløgupláss á Eystaruvág. Annaðhvørt inni við Bursatanga ella úti í Krókinum - fram við Molabryggjuni. Men er tað líka so natúrligt, at tann nýggja Norrøna skal liggja inni á botni á Eystaruvág? Stuttligt er at hava eitt skip næstan í miðbýnum í Havnini. Men var hetta tann skilabesta loysnin, tá hugsað verður um, hvussu trongt tað er at koma inn millum molar og Tinganes?

Í øllum førum varð hesin spurningurin ikki nóg væl viðgjørdur. Tað var ikki meira enn komið alment fram, at Havnar kommuna hevði í umbúna at gera tvær ferjulegur við Bursatanga, tá Landsverkfrøðingurin boðar frá, at hann mælti frá at gera tvær ferjulegur inni á Eystaruvág. Hetta merkir, at Landsverkfrøðingurin, sum skuldi havt førleikan um hendi, um nøkur manning er eftir á Havnadeildini væl at merkja, ikki var tikin við upp á ráð!

Harafturat skulu vit minnast til, at Smyril vaks nógvar metrar. Frá at vera væl minni enn gamla Norrøna, fer hann heilar 25 metrar fram um hana í longd. Tað merkir, at nú skulu heilir tveir "line´arar" liggja inni við henda molastubban, Bursatanga, sum mátti umbyggjast fyri nógvar milliónir krónur. Ein kostnað og eitt arbeiði, sum Vinnumálaráðið ikki tóktist at vilja hava nakað við gera, men í staðin lat Tórshavnar kommunu upp í hendi at bera og gera.

Harafturat tóktist sum eingin gáaði um, at tað fór at verða sera trongligt, nú tvey stór skip skuldu amast upp at Tinganesi. Tá tað so kom fram, at neyðugt var at dýpa fram við nesinum, varð greitt, at nú var eldur í skálanum. Nústani tá kom Fornminnisnevndin upp í ætlanina!!! Og nevndin sigur, sum vituligt er, at tað ber ikki til at fara spreingja lendið undir Tinganesi. Nevndin mælir harafturat til at gera eina økisfriðing bæði á Tinganesi og út á sjógv.

Sjálvandi skuldu allir partar - kommuna, landsstýri, strandferðsla, Smyril Line og friðingarmyndugleiki - sett seg niður frammanundan og viðgjørt málið út í æsir, so vit ikki komu i ta støðu, sum vit eru komin út í!

Og til landsstýrismannin í mentamálum er at siga, at hann skal ikki hava undirtøku fyri hesum ella hasum í landsstýrinum, hóast tað er skilligt, at hann vil tryggja sær, at aðrir landsstýrismenn ikki fara í stríð við hann eftir eina avgerð. Hann hevur bara eitt at gera í hesum føri og tað er at halda seg til friðingarmyndugleikan og tilmælið frá sínum egna embætisverki!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Óhugnaliga líkar grundgevingar

**Edvard Joensen**
*Sandavági*



Viðgerðin av útlendingamálinum, málið um útlendingar í føroyskum ítrótti, er við at fara av kós. Nú er hon vorðin til eitt kjak millum politikarar og ítróttarbossar um, hvør hevur lagt hvønn undir hvat. Men ymiskt, sum frammi hevur verið, er á slíkum støði, at tað er ræðandi

Ymsar meiningar, ið hava verið at hoyrt og sæð í kjakinum, eru so býttar, at tær leiða hugin aftur til ávísa rørslu í Europa í tríatiárunum í seinastu øld. Tað var ein ávísur fólkabólkur, sum varð lagdur undir at hava skuldina av øllum ólukkum, sum raktu heimspartin. Og nú rógva summi fólk her hjá okkum fram undir, at ein ávísur bólkur av fólki kann hava gjørt, at onnur ganga arbeiðsleys her í Føroyum.

Ansið nú eftir og fáið kjakið aftur á tað, tað snýr seg um. Nevniliga um smáu ítróttarfeløgini hava nakran møguleika at yvirliva uttan hesi fólkini, sum ítróttarliga eiga lívið í teimum. Tað fíggjarliga lívið eiga lokalu arbeiðsplássini, sum hava víst sera stóra vælvild og stórsinni móti feløgunum.

Smáu bygdarfeløgini hava ikki møguleikar at gera seg galdandi á tí støði, ítrótturin er komin á í dag, uttan hjálp frá hesum fremmandu ítróttarfólkunum. Og tey hava als ikki ráð til at løna teimum fult ella 60 prosent. So einfalt er tað. Tann dagin, tað verður krav, kunnu tey akkurát tað sama negla hurðina í felagshúsinum.

Tað er møguligt, at eitt stórt høvuðsstaðarfelag við bara einari ítróttargrein - sum ikki so frægt sum fær mannað eitt kvinnulið - men kann loyva sær at selja lutaseðlar við vinningum fyri millíónaupphædd, kann løna einum fulltíðarsettum donskum venjara.

Men eitt lítið bygdarfelag, sum hevur bæði hondbólt og fótbólt umframt kappróður at forsvara, hevur ongan møguleika.

Lítla felagið skal syrgja fyri at fáa ungdómsvenjarar, sum av tilvild eru útlendskir - eingin føroyingur fæst - til fótbóltin. Felagið noyðist, um hondbóltsliðið skal mannast, at fáa útlendskar leikarar, sum, uttan at taka nakað frá nøkrum øðrum, hava verið við til at hækkað støðið. Felagið hevur kapphróðrarbátar, sum skulu haldast viðlíka.

Umframt hevur felagið part av vallarrakstri at forsvara. Felagshúsið skal haldast. Og alneyðugt er við neysti til kappróðrarbátarnar. Tað verður ikki minsta takið.

Tá so stóru feløgini samstundis liggja sum fluga á lorti eftir hvørjari nýggjari stjørnu, sum tendrast í hesum smáu feløgunum - umframt at tey fara við útlendingunum eisini, eftir at onnur hava havt stríð og útreiðslur av at fáa tey til landið - ja, so hava hesi smáu ongan møguleika at gera seg galdandi ítróttarliga. Harvið hvørvur eisini áhugin fyri feløgunum, sum so detta burtur ímillum. Tað verður lítið áhugavert við eini landskapping við einum fýra liðum í vaksnamannadeildunum.

Skal tað so gerast so tvørligt, at vælviljaðu vinnuvirkini á staðnum ikki sleppa at hava tey útlendsku ítróttarfólkini til arbeiðis eitt hálvt ár ella so í part, lækkar støðið beinanveg. Tí hvør skal fáa til vega hendan peningin, sum leikarar skulu hava fyri at sleppa at halda støðinum uppi?

Taka vit Vágar sum dømi, kann vísast á, at í oynni eru tíggju ítróttarfeløg og minst sama tal av øðrum áhugafeløgum og bólkum, sum skulu kappast um somu fólkini til bingo, dans, køkutombola, neytalortar og Guð viti hvat.

Tað er greitt, at eingin vil geva seg, og tískil liggja tey flestu eftirá. Tann, sum so hórar undan, hevur kortini ongan møguleika at klára seg í kappingini við tey stóru feløgini við breiða fólkagrundarlagnum, sum kunnu keypa 20.000 lutaseðlar.

Væl vitandi, at landsstýrismaðurin hevur eina greiða útlendingalóg at halda seg til, verður mín áheitan kortini, at hann roynir at fáa eitthvørt undantak, eins og undanmaður hansara var í ferð við, soleiðis at hesin avmarkaði bólkurin av fólki sleppur at halda fram við tí virki, sum byrjað er. Nevniliga at hjálpa til at lyfta ítróttarliga støði okkara at altjóða hæddum.

Okkum dámar væl at reypa. Men sum nú sær út, kann skjótt henda, at einki verður at reypa av.

# Útlendingamálið

**Gestur Hovgaard og Heini í Skorini**

Í mikudagssosialinum er samrøða hjá Heina í Skorini við Gest Hovgaard um málið við útlendskum ítróttarfólkum í Føroyum.

Gestur hevur yvir fyri Sosialinum víst á sína ónøgd, tí hann heldur greinin við síni uppseting fær eina óneyðuga eksponering, har sakligi parturin av henni missir sítt virði. Vit hava tosað um hetta, og eru vit samdir um:

1) at Gestur ikki úttalaði seg sum »samfelagsfrøðingur«, men sum formaður í einum ítróttarfelagi.

2) at orðið »tápuligt« ísv. uppskotið hjá Innlendismálaráðnum er ein misskiljing okkara millum.

3) at greinin átti at verið send til viðmerkingar hjá Gesti, so at sloppið varð undan áðurnevndu misskiljingum.

Greinin hevur - saman við øðrum viðmerkingum í fjølmiðlunum - ført við sær, at Innanlendismálaráðið hevur sent út tíðindaskriv um málið. Vit vilja gjarna gera greitt, at greinin á ongan hátt leggur Innlendismálaráðið undir at geva útlendingum skuldina fyri nakað arbeiðsloysi í Føroyum.

Við hesum leggja vit nevndu grein afturum okkum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Niels R. Finsen - Fávitska - Okkultisma

**Heri Mohr**



Í "Skáanum" 17. í h.mð. hevur Pól á Kletti skrivað áhugaverda grein og útskrift úr bókini "Megnar menn og megnar konur" eftir Marius Johannesen, sála, um Niels R. Finsen, nú 100 ár eru liðin, síðan hann doyði.

Eitt sindur løgið er tað tó, at vit í greinini hjá Pól á Kletti lesa, at Niels R. Finsen er einasti føroyingur, ið higartil hevur fingið Nobelvirðislønina, meðan Marius Johannesen sigur: "Lat okkum siga tað beinanvegin, hann var ikki føroyingur".

Niels R. Finsen kom til verðina, meðan pápin Hannes Finsen, sum var av íslendskum uppruna, var fyrst fúti og seinni amtmaður í Føroyum (1858-1884). Sonurin Niels gekk í realskúla í Havn, tók studentsprógv í Reykjavík og læknaútbúgving á universitetinum í Keypmannahavn.

Í greinini hjá PáK lesa vit, at ein føroyingur í Keypmannahavn skal hava sagt við NRF: "Fittur ert tú í hondunum", og til hetta svaraði NRF: "Bátasmiður kann eg verða, um ikki annað".

Um hetta kunnu vit lesa, hvat Christian Bærentsen av Sundi skrivaði í "25 ára Minnisrit 1910 - 20 september - 1935", sum Hitt Føroyska Studentafelagið í Keypmannahavn - har hann var heiðurslimur - gav út í 1935. Studentafelagið hevði fingið ein føroyskan bát. "Ein tann ídnasti á bátinum var Niels Finsen - og eisini raskur at smíðja, um okkurt var at bøta um bátin. Eg hitti hann ein dagin - tað var nøkur ár seinni -í støðni, hann sat og smíðaði í bátinum, og eg segði við hann: fittur ert tú í hondunum! Hann svaraði mær aftur: Á ja, snikkari kann eg kanska verða, um ikki annað". Í somu grein fáa vit at vita, at í 1881 - 1883 búði CB á Regensini í Keypmannahavn saman við Thomas Thomsen, Niels R. Finsen og Jakob Jakobsen. Christian Bærentsen var amtmaður her í Føroyum frá 1897 til 1911, løgtingsformaður og høgt virdur dómari og formaður í landsrættinum.

Tað stóra bílætið í "Skáanum" av Niels R. Finsen saman við 6 starvsfeløgum er rættiliga sigandi soleiðis at skilja, at hóast eingin upplýsing hevði verið um nøvnini á teimu 7 monnunum, hevði tað borið til at peikað á NRF, tí á myndini situr hann við hendur í favn.

Hetta at sita ella standa hendur í favn, tá ið bílæt skal takast, er serføroyskt eyðkenni: Skipsmanningar, ítróttarfólk o.o. ella einstaklingar: Jóannes Patursson, Mads Andr. Winther o.o. favn. - Hetta fyribrigdið avmyndar miðvísa persónmensku og als ikki hetta at gera seg upp, sum onkur vil halda.

Fyri nógvum árum síðani virkaði ein serlækni í húðsjúku í Klaksvík. Hann æt Lomholt, og mær er fortalt, at hann var abbasonur Niels R. Finsen. Pápi hansara - navnframur professari í húðsjúku, Svend Lomholt, giftur við dóttir NRF - skrivaði bókina "Niels R. Finsen, En Biografi" í 1943.

Mánamorgunin 19. í h.mð. hevði "Góðan morgun Føroyar" í útvarpinum eina samrøðu millum ein lektara á fróðskaparsetrinum og ein vert hjá ÚF, og evnið var: "Hvussu kunnu vit forða fyri at ung fara í útlond at lesa? - Hann náði okkum !

Tvær ferðir um dagin kunnger Sjónvarp Føroya , at "Atlantic Airways stuðlar veðrinum".

Hesir almennu stovnar áttu at greitt okkum deyðiligu frá, hvussu flogfelagið er komið í samband við yvirnatúrligar loftbornar kreftir við stuðli til veðrið. Og tað í eini tíð, hvar orðið "stuðul" er degraderað og skýggjað av okkara politikarum.

# Politisk semja um at forfylgja ítróttinum?

**Heðin Mortensen**
*ÍSF-forseti*



Í viðmerking til týsdagsútgávuna av Sosialinum leggur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, undirritaða undir at siga ósatt í málinum um útlendsku ítróttafólkini. Hann boðar frá, at ÍSF hevur verið við í viðgerðini av málinum um útlendsku ítróttafólkini. Hetta er bara ikki satt.

Ítróttasamband Føroya havur havt tveir fundir við landsstýrismannin í innlendismálum, Jógvan við Keldu. Tó hevur talan ikki á nakran hátt verið um samráðingar ella eina roynd at finna loysnir, men bert um einvegis kunning frá landsstýrismanninum. Sjón fæst fyri søgn, tí ongar av atfinningunum hjá Ítróttasambandi Føroya eru tiknar til eftirtektar.

Landsstýrismaðurin hevur gjørt ítróttinum greitt, at hann ikki vil boyggja seg longur enn so, at ítrótturin skal gjalda í minsta lagi 60 prosent av einari arbeiðaraløn til útlendsku ítróttafólkini. Og her er knívskorið, tí tað megna ítróttarfeløgini ikki.

### Seravtala ella politiskt alibi?

Tað tykist løgið, at landsstýrið roynir at samráða seg til eina verri avtalu enn hana, ið stóð landsstýrinum í boðið fyri jól. Fyri fýra mánaðum síðani var ein seravtala fyri ítróttafólk fingin upp á pláss, ið einki nevndi um tey 60 prosentini.

Samfelagsbúskaparligu grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum eru longu afturvístar av samfelagsfrøðingum. Útlendsku ítróttafólkini eru so fá, at tey ikki hava stórvegis ávirkan á føroyska arbeiðsmarknaðin, so har skal ikki leitast eftir einari orsøk til jánkasliga útlendingapolitikkin, ið nú skal rekast í Føroyum.

Orsøkirnar til ynski um at fáa ein verri avtalu eru ivaleyst at finna í øðrum samanhangi. Tað er greitt, at landsstýrismaðurin í innlendismálum als ikki hevur flutt seg í málinum.

Um landsstýrismaðurin ger eina 60 prosents avtalu við danir, kann hann við góðum rætti siga, at hann hevur gjørt eina seravtalu fyri ítróttafólk. Men samstundis veit hann fullvæl, at tey 60 prosentini hava tann ynskta virkningin, at eingi útlendsk ítróttafólk verða at síggja í okkara kappingum í fótbólti, hondbólti og flogbólti ella øðrum ítróttagreinum í framtíðini.

### Eggjar til »kreativar« loysnir

Tað frættist, at ítróttafeløg kring landið royna at bjarga sær undan forfylgingini sum frægast, í samráð við lokalt vinnulív og kommunurnar.

Tað tykist margháttligt, at landsstýrismaðurin við lógarmálum skal verða tann, ið við ætlaðu avtaluni skal eggja til kreativar »loysnir«.

Hetta átti at fingið klokkurnar at ringt onkunstaðni, at feløg - longu áðrenn avtalan er gjørd teirra vegna - royna at finna loysnir, so tey kunnu sleppa uttan um avtaluna hjá landsstýrismanninum í lógarmálum.

At landsins myndugleikar við sjuskutum og hálvlidnum lógararbeiði vilja kroysta ítróttafeløgini so hart, er ikki til at skilja, tí tað er púra óneyðugt, tá tey í nógvar mátar eru nóg illa kroyst frammanundan.

Og enn verri ber til at skilja, at landsstýrið í hesum máli hevur gjørt nakað til ein trupulleika, ið als ikki var tað frammanundan - enntá sum eitt skálkaskjól fyri at loysa málið.

### Ítrótturin einki uppskot sæð

Ítróttasamband Føroya hevur ikki enn sæð nakað uppskot til seravtalu á økinum. Vanligur siður er annars, at uppskot til møguligar avtalur verða send avvarðandi pørtum til hoyringar.

Málið er óformliga umrøtt við løgmann í øðrum høpi, men tað stendur fast, at eingin fundur hevur verið við løgmann um hetta mál.

Hóast tað hevur gingið sum rótasúpan, at landsstýrismaðurin í innlendismálum einsamallur stendur aftan fyri herferðina móti útlendsku ítróttafólkunum, boðaði løgmaður sunnudagin í Útvarpi Føroya frá, at atgerðin hevur eitt samt landsstýri aftan fyri seg.

Sostatt er líkt til, at útlendingapolitikkurin hjá landsstýrismanninum við innlendismálum hevur eina greiða politiska semju aftan fyri seg. Tað er einki minni enn hugstoytt, tí hetta fortelur bara, at bæði einstaklingar og flokkar innan landsstýrissamgonguna hava kúvent í málinum og nú reka heilt annan politikk, enn væntandi var av teimum.


Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg


# Amnesty: Børn offur í stríðnum

FORDØMING
*Amnesty International*

Amnesty fordømir í dag ógvuliga hvassliga álopið í Basra í gjáramorgunin, sum kravdi minst 58 mannalív, flestu teirra børn sum vóru á veg í skúla.

Vitleys álop sum hetta avdúka fullkomiliga vantandi virðing fyri mest grundliggjandi mannarættindunum – rættinum til lív. Í ringastu meldurtíðini mikumorgunin brustu fleiri bumbur samstundis tætt við tríggjar politistøðir í Basra og nærindis politiskúlanum í Zubair. Tveir skúlabussar, sum koyrdu framvið, vórðu raktir.

Tey, sum skipaðu fyri bumbuatgerðini, mugu koma fyri rættin fyri heilt klárt at peika á, at tey sum fremja slíka brotsgerð ikki sleppa snikkaleys.

Stríðið í Irak krevur alt fleiri sivil offur. Vantandi trygd avmarkar gerandisdagin hjá hvørjum einasta iraka, og einhvør kann verða dripin av vitleysu álopunum. Týsdagin vórðu 22 fangar dripnir, tá ið ein granat brast í Abu Graib fongslinum vestan fyri Bagdad. Meira enn 600 fólk, teirra millum fleiri kvinnur og børn, vórðu dripin í tí hersetta býnum Falluja. Støðan hjá teimum sivilu í Falluja er ógvuliga ótrygg, og Amnesty ber ótta fyri, at tey sivilu aftur fara at enda mitt í stríðnum, og at tann humanitera vanlukkan versnar, um tað ikki verða gjørd munagóð tiltøk fyri at forða hesum.